# Listasavnið eigur nú Bládýpið

**LIST** Tróndur Patursson fer nú at umvæla listaverkið Bládýpið, sum síðan verður formliga latið Listasavni Føroya sum gávu

Randi Jacobsen

Umsíðir er framtíðin hjá listaverkinum Bládýpinum tryggjað.

Bládýpið er bingjan, kløðd innan við glasverkum, sum Tróndur Patursson gjørdi til eina stóra bingjuframsýning í Keypmannahavn í 1996.

Síðan 1997 hevur Bládýpið staðið vestan fyri listasavnið, er onkun tíð lænt út, men ikki havt nakran veruliga góðan.

Nú er so eydnast Tróndi Paturssyni og listasavninum at gera eina avtalu um Bládýpið.

Avtalan sigur, at Listasavn Føroya skal taka ímóti Bládýpinum sum gávu frá Tróndi Paturssyni.

Men fyrst má Bládýpið umvælast. Nógv glas er brotnað, jarnið er rustað, og haraftrat hevur verkið fingið mangan snuddin, tá ið tað hevur verið burturi og ferðast.

Upprunaliga var tað Norðurlandahúsið, sum lønti Tróndi Paturssyni fyri at gera Bládýpið, og avtala er nú gjørd um, at Norðurlandahúsið rindar listamanninum fyri at umvæla verkið.

### Umvæling á skipasmiðjuni

Bládýpið er flutt út á skipasmiðjuna, har Tróndur Patursson komandi mánaðirnar fer at arbeiða við at umvæla verkið. Tað arbeiðið verður ikki liðugt fyrr enn seint í heyst ella komandi vár, sigur Tróndur Patursson.

Eins og listamaðurin er Helgi Fossádal, stjóri á Listasavni Føroya fegin um avtaluna.

Tað bar ikki til, at verkið bara varð standandi, tí tað var beinleiðis vandamikið fyri fólk at fara inn í. Børn spældu eisini har, tá ið bingjan enn stóð opin.

Helgi Fossádal sigur, at nógvar misskiljingar hava verið í málinum. Líka til nú hevur Tróndur Patursson átt verkið, og tí skrivaði hann til hansara og bað hann flyta verkið burtur vegna vantandi trygd.

Í mars í fjør samtykti nevndin fyri Listasavn Føroya at savnið skuldi taka ímóti Bládýpinum sum gávu, men ikki í so ringum standi sum tað var í.

So skjótt sum verkið er liðugt umvælt, verur tað flutt aftur til listasavnið og verður tá partur av føstu framsýningini. Ikki er endaliga avgjørt, hvar tað skal standa, sigur Helgi Fossádal.



*Sátt og semja er nú um Bládýpið, eftir at listamaðurin Tróndur Patursson og stjórin á Listasavni Føroya, Helgi Fossádal hava skrivað undir, at savnið tekur ímóti Bládýpinum sum gávu, tá ið verkið er umvælt*



*Við Tom Jacobsen sum talsmanni fekk Dan Knudsen, ríkisumboðsmaður í dag handaðar 4.671 undirskriftir frá fólki, sum mótmæla, at Markus er tikin frá ættleiðingarforeldrunm í Føroyum*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Senda mótmælini til Danmarkar

**MARKUS** Vinfólk og skyldfólk handaðu fyrrapartin Dan Knudsen, ríkisumboðsmanni undirskriftir frá 4.641 fólk, sum hava mótmælt, at etiopiski drongurin Markus í seinastu viku varð tikin aftur frá ættleiðingarforeldrunum

Randi Jacobsen

Klokkan 10 í morgun fóru nøkur fólk á skrivstovuna hjá Ríkisumboðnum, og beinanvegin var Dan Knudsen, ríkisumboðsmaður og tók ímóti teimum.

Ørindini vóru at handað ríkisumboðnum undirskriftir frá 4.671 fólkum, sum hava mótmælt, at etiopiski drongurin Markus í seinastu viku varð tikin frá foreldrum sínum í Føroyum. Drongurin varð tikin frá teimum, tí góðkenningin av teimum sum ættleiðingarforeldur varð tikin aftur.

### Biðja um nýggja viðgerð

Ein vinkona hjá Maj-Britt og Inga Dam Jacobsen tók stig til undirskriftinnsavningina. Undirskriftir vóru savnaðir á netinum og á seðlum, sum hava ligið í handlum.

Vinfólk og skyldfólk hjá teimum handaðu ríkisumboðsmanninum undirskriftirnar.

– Vegna Markus, familju og tey 4.761 fólkini heiti eg á teg um at hyggja at tí menniskjaliga í málinum og taka málið upp til nýggja viðgerð, segði Tom Jacobsen, beiggi Maj-Britt Dam Jacobsen við Dan Knudsen.

Hann helt tað ikki vera beint, at Markus varð fluttur til Danmarkar orsakað av gomlum syndum hjá foreldrunum. Einki var at seta fingurin á, meðan Markus var her.

– Vit elska Markus yvir alt, segði Tom Jacobsen.

Dan Knudsen var ovfarin av teimum mongu undirskiftunum. Ríkisumboðið er liðugt við hetta málið, og ríkisumboðsmaðurin segði, at hann nú fór at senda undirskriftirnar niður til Familjestyrelsen, sum er evsti myndugleiki í ættleiðingarmálum.

Hann nevndi eisini, at málið nú er vorðið politiskt.

– Annars kann eg siga, at Markus kom væl til Danmarkar, og at hann hevur tað gott. Hann er hjá fólki, sum taka sær væl av honum, men eg má viðganga, at hetta er eitt syrgiligt mál, segði Dan Knudsen.

# Skuldsettur fyri innbrotið

Randi Jacobsen

Kriminalpolitiið heldur seg nú hava fulla vissu fyri, hvør tað var, sum 13. februar breyt inn hjá Bergtóru Poulsen á Stangarvegnum í Klaksvík.

Tað var eitt óvanligt innbrot, tí einki uttan seingjarklæðir vórðu horvin, og tann, sum breyt inn, hevði lagt síni egnu undirklæðir eftir seg. Alt húsið var svínað til, og har var blóð frá manninum, sum hevði skorið seg, tá ið hann breyt inn.

Nakað eftir innbrotið varð ein maður í 20-árunum til avhoyringar. Hann dugdi tá ikki at greiða frá, hví hann hevði skøvur á ørmunum.

DNA-roynd varð tikin av manninum, og royndin svaraði fullkomiliga til blóðið, sum var í húsunum.

Týsdagin var maðurin til avhoyringar hjá kriminalpolitinum. Hann játtaði seg ikki sekan, tí hann mintist einki frá februarnáttini. Hann hevði verið dýrandi fullur, segði hann við politiið.

Verður ákæra rreist móti manninum, og hann verur dømdur, aknn hann vænta sær stórt endurgjaldskrav, ti tað var eitt stórt upptak at fáa skil á húsini aftur eftir innbrotið.